# Lærarafelagið stevnt

**Nakrir lærararar hava stevnt sínum egna fakfelag, Føroya Lærarafelagi. Orsøkin til stevningina er hon, at teir ikki halda seg hava fingið ta eftirlønina, sum teimum varð lovað av Lærarafelagnum. Formaður Lærarafelagsins, Elsa Birgitta Petersen, heldur, at stevningin er komin skeivt fyri. Hon skuldi heldur verið send landsmyndugleikunum**

STEVNING
*t fan korini*



*Elsa Birgitta Petersen heldur, at stevningin er komin skeivt fyri, og tað skuldu verið myndugleikarnir, ið vórðu stevndir, heldur enn Lærarafelagið*

Ein stevning liggur í løtuni hjá fútanum. Tað eru 25 lærarar, sum allir eru farnir frá við eftirløn, ið hava stevnt Føroya Lærarafelagi.

Lærararnir siga, at teir kenna seg snýttar av felagnum, tí teir ikki hava fingið ta eftirløn, sum felagið annars lovaði teimum. Lærararnir skilja sostatt støðuna soleiðis, at tær upplýsingar, sum teir siga seg hava fingið frá Lærarafelagnum, ikki hava verið rættar.

Lærararnir fingu eitt tilboð um at fara frá við eftirløn, áðrenn teir vórðu náddir eftirlønaraldur. Hetta var ein avtala, sum Lærarafelagið samráddi seg fram til – tann sonevnda 60-ára avtalan.

Henda avtalan var fyri lærarar, ið vóru farnir um tey trýss, og sum høvdu arbeitt sum lærarar í tredivu ár.

Lærararnir, sum hava stevnt, eru allir farnir frá í tíðini frá 1988 til 1997.

### Donsk ella føroysk eftirløn

Teir ónøgdu lærararnir siga seg eisini hava fingið lyfti um, at teir skuldu fáa føroyska eftirløn, sum er nakað hægri enn tann danska, tá teir fóru frá, hóast teir eru danskir tænastumenn. Ta føroysku eftirlønina hava teir tó ikki fingið, nú eftir at lærararnir hava tikið av tilboðnum, og tað eru teir ónøgdir um.

Lærararnir siga seg nú fáa eina lægri eftirløn enn fleiri av teimum, sum fóru frá við eftirløn í tíðini beint eftir, at teir fóru frá.

Upphæddin, sum talan eftir øllum at døma er um, er millum 1000 og 1500 krónur um mánaðin. Hetta eru nógvur peningur, og lærararnir kenna seg snýttar fyri hesa upphædd.

Lærararanir siga, at teir kenna seg noyddar at stevna felagnum, tí fyrningarfreistin gekk út tann 1. januar í ár. Um teir ikki stevndu tá, høvdu teir kunnað staðið eftir við ongum. Teir siga, at lærarafelagið ikki vildi leingja fyrningarfreistina, og tí var einki annað at gera.

### Stevningin komin skeivt fyri

Elsa Birgitta Petersen, formaður í Lærarafelagnum, sigur, at stevningin er komin skeivt fyri, tí tað er ikki felagið, sum hevur gjørt mistakið, men tað eru landsmyndugleikarnir, ið ikki hava gjørt sítt arbeiðið til lítar.

– Tað kennist eitt sindur bakvent og hugstoytt, at tað er Lærarafelagið, sum verður stevnt í hesum málinum. Vit væntaðu, at hesin bólkurin kom til okkara og bað okkum um at stevna myndugleikunum, men ístaðin er tað felagið, sum skal fyri rættin, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Lærararnir siga, at teir vórðu næstan lokkaðir at fara frá fyri tíðina, men hesum vísir Elsa Birgitta aftur.

– Eingin varð trýstur til at fara frá, men hetta var eitt val hjá teimum. Onkur annar valdi ikki at fara frá.

Elsa Birgitta ásannar, at lærararnir hava orsøk at kenna seg snýttar, men vísir annars á, at nevndin hevur gjørt nógv fyri at fáa myndugleikarnar at skilja ta truplu støðu, hesir lærararnir eru komnir í. Tað er ikki Lærarafelagið, um hevur ta endaligu ábyrgdina av hesum máli, og lærararnir hava tí púra misskilt málið.

– Tað vóru myndugleikarnir, sum lovaðu undir samráðingunum til ta fyrstu avtaluna, at lærararnir skuldu fáa føroyska eftirløn, men lógin varð útsett í tinginum, og tí eru tað myndugleikarnir, ið hava útholað hesa avtaluna, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Tískil er tað eisini felagið, ið kennir seg snýtt av myndugleikunum, eins og lærararnir kenna seg snýttar av Lærarafelagnum.

## Russiskur klavermeistari vitjar Føroyar



Vestmennningar og havnamenn kunnu vanta sær eina stóra uppliving við russiska klaversnillinginum Alexander Vaulin, sum fer at leika sær á tangentunum í Vestmanna skúla hósdagin 1. febr. kl. 19:30 og í Norðurlandahúsinum sunnudagin 4. febr. kl. 16:00.

Á skránni eru stór norðurlendsk klaververk eftir kend tónaskald eins og danan Gade, norðmannin Grieg og svian Stenhammer, umframt eitt verk av nýggjari dato eftir danan Ilja Bergh.

Fólk kunnu vanta sær klaverspæl á sera høgum støði eftir henda russiska topp-pianist, sum av manglandi frælsi í síni kunstnerisku útfoldan tók sekkin og flutti til Danmarkar í 1989. Vaulin er í Danmark vorðin ein virkin pianistur bæði sum solistur og undirleikari.

Hann er kendur fyri sítt virtuosa og følsomma spæl, sum eisini hevur givið honum møguleikar at konserttera víða um í Europa.

Hann hevur innspælt 5 fløgur fyri EMI og Classico og undirvísir m.a. á klaverperfektiónsskeiðum í Portogruaro og Celle-dei-Puccini í Italiu.

# Tað almenna er við ígjøgnum Framtaksgrunnin

**Landsstýrið vil ikki beinleiðis seta meiri partapening í Smyril Line, men heldur seg verða við umvegis Framtaksgrunnin**

SMYRIL LINE
*y un akst in*

Fríggjadagin boðaði Vinnumálastýrið Smyril Line frá, at landsstýrið fer ikki at seta meiri partapening í felagið.

Grundarlagið undir avgerðini hjá landsstýrinum er atlit til vinnupolitikkin og onnur í somu bransju.

Í einum notati, sum Vinnumálastýrið hevur gjørt í sambandi við umbønina frá Smyril Line um at hækka partapeningin, verður staðfest, at tað almenna er við umvegis Framtaksgrunnin.

– Sæð út frá vinnupolitikkinum má hetta sigast at vera rætti háttur til møguligt kapitalinnskot í ætlaðu byggingina av nýgggjum skipi, verður sagt í notatinum hjá Vinnnumálastýrinum.

### Kravt størri trygd

Týska skipasmiðjan, sum skal byggja nýggja skipið til Smyril Line, hevur kravt størri trygd fyri, at Smyril Line er ført fyri at gjalda fyri skipið.

Fyrst royndi Smyril Line at fáa landskassaveðhald fyri láni upp á 30 milliónir krónur, men hetta noktaði landsstýrið fyri.

Síðani hevur Smyril Line arbeitt við eini ætlan um at hækka partapeningin við 125 milliónum.

Hetlendingar eru sinnaðir at seta 50 milliónir í felagið og íslendingar 10 milliónir. Harafturat hevur Framtaksgrunnurin játtað at seta 25 milliónir krónur í Smyril, men hetta er treytað av, at tveir til fýra aðrir sterkir í leggjarar eru við.

Smyril Line hevur sostatt fingið játtan um 85 milliónir krónur, og nú verður arbeitt við at finna aðrar íleggjarar. Smyril Line hevur fingið freist frá týsku skipasmiðjuni til 1. februar at skaffa neyðuga partapeningin.

### Kanska útlendskur meiriluti

Í løtuni er partapeningurin í Smyril Line 15 milliónir krónur, og tá hesir pengar verða lagdir saman við teimum 85, sum eru játtaðir higartil, er skjótt at staðfesta, at útlendsku pengarnir eru í meiriluta sum er.

Hetlendingar og íslendingar standa fyri 60 av teimum 100 milliónunum.

Hetta hevur Vinnumálastýrið tikið við í sína meting av støðuni.

– Men við tað at innara virðið í felagnum er væl omanfyri verandi partapening, átti felagið at havt møguleika at uppskriva verandi partapening í felagnum. Hetta er tó treytað av, at íleggjararnir góðkenna uppskrivingina, verður sagt í notatinum hjá Vinnumálastýrinum.

Um felagið á tann hátt skal varðveita meirilutan á føroyskum hondum, verður neyðugt at verandi partapeningur verður uppskrivaður við minst 20 milliónum krónum.

Hvørki hetlendingar ella íslendingar hava kravt ávirkan á leiðsluna í felagnum, men hetlendingar hava kravt ein nevndarlim í felagnum.

### Kappingarneytarnir

Vinnumálastýrið hevur í síni meting av umsøknini hjá Smyril Line tikið við í metingina, at Smyril Line hevur kappingarneytar til farmaflutningin.

– Sum er reka onnur feløg farmaflutning millum Føroyar og útlandið, og spurningurin er, um tað almenna ikki júst hevði gingið ímóti verandi vinnupolitisku stevnu, um peningurin verður settur beinleiðis í Smyril Line fram um onnur felag, verður sagt í notatinum hjá Vinnumálastýrinum.

Landsstýrið ásannar tó, at farleiðin sjóvegis millum Føroyar og grannalondini eru av avgerandi týdningi fyri føroyska samfelagið.

Men hóast hetta gav Vinnumálastýrið Smyril Line noktandi svar upp á umsøknina um meiri partapening.



# Landsstýrið yvirtikið fjarskiftisøkið

**Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, skrivaði í gjár undir avtalu við donsku stjórnina um yvirtøku av lóggávu- og myndugleikaheimildini innan radiofjarskifti**

YVIRTØKA
*John Johannessen*



*Frá 1. januar 2002 er radiofjarskiftið undir føroyskum málsræði. Landsstýrismaðurin í vinnumálum skrivaði í gjár undir avtalu við donsku stjórnuna um at yvirtaka økið*

Radiofjarskifti er føroyskt ábyrgdarøki frá fyrsta januar næsta ár. Hetta gjørdist greitt, tá landsstýrismaðurin í Vinnumálum í gjár skrivaði undir avtalu við donsku stjórnina um yvirtøku av hesum málsøki.

Landsstýrismaðurin sigur í tíðindaskrivi, at við yvirtøkuni eru allar fortreytir til staðar fyri, at føroyskir myndugleikar tilevna lóggávu, sum stuðlar og stimbrar menningina innan fjarskifti og kunningartøkni í Føroyum.

Avtalan er úrslit av samráðingum, sum landsstýrið hevur havt við donsku stjórnina síðani løgtingið í 1997 heimilaði landsstýrinum at taka yvir írestandi partin av fjarskiftisøkinum.

### Víðka lóggávuna

Núverandi lóg um radiofjarskifti er frá 1976. Hon tekur støði í einum radiofjarskiftismarknaði við einum einkarfelagi og byggir á, at hvørt land sær í ávísan mun byggir upp egnar standardir og tilskilar sær serstakan góðkenningarrætt.

Landsstýrið metir ikki lógina vera egnaða í einum alheims fjarskiftismarknaði. Tí er meingingin at dagføra lógargrundarlagið.

Hetta ætlar Bjarni Djurholm at gera við at víðka fjarskiftislógina frá 1997, so hon eisini fevnir um radiofjarskifti. Fyrireikingararbeiðið til hetta er longu farið í gongd í Vinnumálastýrinum.

Landsstýrismaðurin í Vinnumálum sigur í tíðindaskrivi, at miðað verður ímóti, at uppskotið um at víðka fjarskiftislógina verður lagt fyri tingið eftir ólavsøku í ár, soleiðis at fjarskifti, radiofjarskifti og óljóðsviðurskifti verða savnað í einari lóg.

– Fyrimunurin er, at verandi fjarskiftislóg hevur fleiri ásetingar, ið kunnu gerast galdandi fyri øll hini økini, og hartil gerst fjarskifti sum heild nógv ruddiligari og lættari hjá borgaranum at koma til, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum.

### Inntøkufíggjað

Tað kemur ikki at kosta landskassanum nakað at yvirtaka ábyrgdina av radiofjarskiftisøkinum. Fjarskiftiseftirlitið røkir í dag radioeftirlitið, og er arbeiðið inntøkufíggjað. Soleiðis kemur arbeiðið at halda fram. Mett verður ikki, at tað verður neyðugt at víðka uppgávurnar á økinum, hóast tað kemur undir føroyskt málsræði.

Avtalan við donsku stjórnina inniber, at danir framhaldandi koma at røkja altjóða viðurskiftini innan radiofjarskifti, eins og higartil.

# Jógvan viðger vísmannafrágreiðingina

**Sonevnda vísmannafrágreiðingin um framtíðar avbjóðingar hjá norðurlendska samstarvinum verður í hesum døgum viðgjørd í Helsingfors í Finnlandi. Jógvan við Keldu, tingmaður, umboðar Føroyar á fundinum**

VÍSMANNA-FRÁGREIÐINGIN
*John Johannessen*

Í gjár varð fyrsti felags fundurin settur millum norðurlendsku samstarvsráðharrarnir og formansskapin í Norðurlandaráðnum um sokallaðu vísmannafrágreiðingina. Fundurin verður hildin í Helsingfors í Finnlandi.

Vísmannafrágreiðingin er ein frágreiðing, sum viðger framtíðar skipanina av norðurlendska samstarvinum. Frágreiðingin varð løgd fram á Norðurlandaráðsfundinum í Reykjavík seinasta heyst.

Tingmenninir, Jógvan við Keldu og Dan Reinert Petersen, sum eru umboð føroyinga í Norðurlandaráðnum, hava ynskt at vera við á fundinum. Hetta er játtað teimum. Teir hava eygleiðarastøðu í formansskapinum við møti-, talu- og uppskotsrætti.

### Tingnevndirnar uppí

Vísmannafrágreiðingin leggur upp til enn størri samstarv í Norðurlandaráðnum, og í hesum sambandi kemur hon við nøkrum víðfevndum uppskotum um, hvussu samstarvið skal broytast.

Millum annað skjýtur vísmannabólkurin upp, at tingnevndirnar hjá einstaku tingunum verða drignar meira upp í arbeiðið hjá Norðurlandaráðnum. Og tað er millum annað hetta uppskot, ið skal viðgerast á fundinum, har Jógvan við Keldu umboðar Føroyar.

Roknað verður við, at viðgerðin av Vísmannafrágreiðingini fer at halda fram til Norðurlandaráðsfundin, sum verður í Keypmannahavn í Oktober.

Jóannes Dalsgaard frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum umboðaði Føroyar í vísmannabólkinum, sum gjørdi Vísmannafrágreiðingina.



*Jógvan við Keldu umboðar Føroyar á fundinum í Helsingfors um Vísmannafrágreiðingina*


GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

| | |
|---|---|
| **Nissan Primera 1.6** Player, vínreyður, 4 hurðar, árg. 1995, 99.000 km. | 98.000 |
| **Nissan King Cab 4x4 TD** Hvitur, 2 hurðar, árg. 1995, 75.000 km. | 105.000 |
| **Nissan Patrol 3.3 Turbo** H/T, Reyður, 3 hurðar, árg. 1988, 98.000 km. | 25.000 |
| **Opel Corsa 1.4i** Sport 5sp, reyður, 3 hurðar, árg. 1996, 64.000 km. | 79.000 |
| **Citroen Saxo Diesel 1.5D** Gráur, 3 hurðar 51.000 km | 90.000 |
| **Corsa Joy** Gráur, 5 hurðar, árg. 1995, 56.000 km | 76.000 |
| **Corsa Swing 1.4 16v** Bláur, 5 hurðar, árg. 1997, 57.000 km. | 93.000 |
| **Honda Accord 1.8** Grønur, 4 hurðar, árg. 1996, 100.000 km. | 117.000 |
| **Nissan Primera 1.6 SLX** St. car, gráur, 5 hurðar, árg. 1993, | 85.000 |
| **Opel Astra ST. Car** Bláur, 5 hurðar, árg. 1997, 115.000 km. | 105.000 |
| **Opel Corsa 1.4 Swing** Reyður, 3 hurðar, árg. 1998. | 90.000 |
| **Opel Corsa 1.4 16V, Swing** Grønur, 5 hurðar, árg. 1997, 42.000 km. | 95.000 |
| **Opel Corsa 1.4 Swing** Bláur, 3 hurðar, árg. 1998, 36.000 km. | 85.000 |
| **Peugeot 306 XS 2.0** St. Car, bláur, 5 hurðar, árg. 1998, 29.000 km. | 128.000 |
| **Toyota Carina E, Diesel** Grønur, 4 hurðar, árg. 1995, 201.000 km. | 110.000 |
| **Toyota Hi Ace, Diesel** Hvítur, 5 hurðar, árg. 1990, 201.000 km. | 60.000 |

Sosialurin

Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
Tjaldursvegur • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61


